# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eftir hvíldina verður spælið ov einstáttað, meðan alt riggar hjá teimum*

*Sámal Joensen, Føroyar*

# Fólkið vil hava Calderwood

**Skal metast eftir spurnarkanning á heimasíðuni hjá Sosialinum, er eingin ivi um, hvønn føroyingar vilja hava sum nýggjan landsliðsvenjara**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Eftir at tað í gjár varð staðfest, hvørjir teir tríggir seinastu kandidatarnir til landsliðsvenjarastarvið eru, varð ein sonevndin quick-poll løgd á netið, har lesararnir hjá Portalinum og Sosialinum kunnu greiða atkvøðu um, hvønn av teimum trimum venajrakandidatunum tey ynskja til landsliðsvenjara.

Starvsnevndin hjá FSF skal seinnapartin í dag taka støðu til, um teir fara til samráðingar við Colin Calderwood, Flemming Serritslev ella Luka Kostic, men skal metast eftir atkvøðugreiðsluni, er eingin sum helst ivi um, hvør er fremsta ynskið til sessin.

Klokkan 11 í dag høvdu 1.600 fólk greitt atkvøðu, og av hesum ynskja 62%, at nýggi landsliðsvenjarin eitur Colin Calderwood. Flemming Serritslev hevði tá fingið 22% av atkvøðunum og Luka Kostic hevði 16% av atkvøðunum.

Nú skulu slíkar kanningar á netinum sjálvandi altíð takast við ávísum fyrivarni, men við somikið stórum tali av atkvøðum og somikið greiðum prosentbýti er lítið at ivast í, at kanningin í stóran mun endurspeglar eina almenna áskoðan.



*Stendur tað til lesarar hjá Portalinum og Sosialinum er eingin ivi um, at FSF skal royna at fáa skotska Colin Calderwood í føroyska landsliðsvenjarasessin*

*Mynd: Polfoto/AP*

# Í læru hjá teimum bestu

**Sum partur av Oyggjaleikafyrireikingunum fara tríggir føroyskir kastarar í næsrum til Svøríkis, har nøkur av heimsins bestu fræslu ítróttafólkum eisini hava sína dagligu gongd**

FRÆLSUR ÍTRÓTTUR
*Tíðindaskriv*

Týsdagin, 27. januar, fara frælsu ítróttarfólkini, Randi Kúrberg, Rógvi Højgaard og Heri Ziska til Vaxjø í Suðursvøríki at venja í eina viku. Har fara svenski landsliðsvenjarin í spjótkasti og maðurin, sum millum annað venur heims- og olympiska meistaran í diskuskast, at leggja lag á.

### Millum heimsins bestu

Kastarnir venja miðvíst her heima í Føroyum alt árið, men tað er sera gevandi at fáa nýggj eygu at hyggja at tí tekniska partinum av kastinum. Hetta er orsøkin til, at avgjørt er at fara til Vaxjø, har venjast kann innandura og í einum frælsaumhvørvi, har støðið er sera høgt høgt. Eitt nú kann nevnast, at í felagnum venja Carolina Kluft (heimsins besti 7-kempari hjá kvinnum í nógv ár) og Magnus Arvidssen (ein av heimsins bestu spjótkastarum). Hóast tað primera við vitjanini her og nú er at menna kastarnar fram móti komandi oyggjaleikunum, har málið er heiðursmerki til allar, so er ein fyrimunur við túrinum, at tey trý, sum øll eisini eru venjarar í Hvirluni, fáa íblástur til, hvussu venjing kann skipast.

### Framúr venjarar

Teir báðir venjararnir, sum koma at leggja lag á, eru Jonas Mellblom, sum eisini legði lag á seinastu tvey árini, tá kastarnir vóru í Vaxjø.

Hin venjarin er íslendingurin, Vesteinn Hafsteinsson, sum í løtuni venur Gerd Kanter, ið er verandi heims- og olympiskur meistari í diskuskasti. Vesteinn vandi annars eisini Joakim Olsen, sum í seinastuni er meira kendur sum dansari, tá Joakim í meir enn eitt ár lá sum nummar eitt á heimsstyrkilistanum í kúlustoyti og vann sær heiðursmerkir í øllum teimum stóru altjóða meistaraheitunum.

## Madrid vil hava Wenger

**Florentino Perez vil aftur hava valdið í Real Madrid. Hesa ferð við Arsene Wenger og Cesc Fabregas sum agni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tá Florentino Perez í 2000 vann sær valdið sum forseti í Real Madrid, var tað við lyfti um, at hann skuldi fáa Louis Figo til felagið.

Tað lyftið helt hann, og nú hevur sami maður aftur engt við stórum lyftum, nú hann aftur roynir at vinna sessin í kongaliga felagnum, nú Vicente Calderon hevur tikið seg aftur eftir álvarsligu ákærurnar um mutur.

Hesa ferð er lyftið, at Arsene Wenger verður settur sum venjari í felagnum, og afturat sær skal franski fótbóltsprofessarin fáa Cesc Fabregas og Kaka sum nøvnini, sum eitt nýtt ættarlið av Galacticos skal byggjast um.

Tvær ferðir áður hevur Arsene Wenger sagt nei takk til sessin sum venjari í Real Madrid. Men hesa ferð er lyftið samstundis, at eingin ítróttarstjóri verður settur fyri Predrag Mijatovic, sum fer úr sessinum, og at Wenger tí fær munandi størri vald enn nakar av undanmonnum hansara í Real Madrid.



*Florentino Perez vil nú aftur hava valdið í Real Madrid*